# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Løgmaður í nýggjum leikluti

Við tiltakinum hjá Virðisbrævamarknaði Føroya (VMF) á Norðuratlantsbryggjuni síggja vit Føroya lømann í nýggjum leikluti sum promotor ella forsprákari fyri føroyskum búskaparligum áhugamálum. Samanbera vit við okkara grannalond, so er tá heilt vanligt, at forsætisráðharri ella landsstýrisformaður taka sær av uppgávuni at vera forsprákari úti í heimi hjá vinnulívi. Vit hava ikki gjørt so nóv av hesum, tó so at nøkur fá dømi vóru undir ABC samgonguni.

Løgmaður kunnaði á Norðurbryggjuni um føroyska búskapin. Endamálið við tiltakinum er at skapa áhuga fyri føroysku feløgunum, sum eru skrásett á VMF, og harvið partabrøvunum teirra. VMF hevði eitt líknandi tiltak í Íslandi í desember í fjør. Vit vita ikki nógv um, hvussu tiltakið í Íslandi eydnaðist, og tað er sjálvsagt ov stutt fráliðið til tess, at fyrireikararnir kunnu gera nakra niðurstøðu. Á Norðurbryggjuni vóru umleið fimti íleggjarar og íleggjararáðgevarar við, og hetta má sigast at vera tekin um jaligan áhuga fyri føroyskum virðisbrøvum.

Í framløgu síni greiddi løgmaður frá støðuni í Føroyum sum heild eins og hann greiddi nærri frá búskaparligu og fíggjarligu støðuni hjá tí almenna, hjá fiskivinnuni og hjá privatu vinnuni sum heild. Uttanlandskuldin hjá privata sektorinum er vend til eitt avlop, og uttanlandskuldin hjá tí almenna er mestsum burtur. Løgmaður greiddi frá arbeiðsmarknaðinum, prísgongdini og útlitinum fyri oljuvinnuni umframt, og legði hann stóran dent á útbúgving og gransking. Visjón 2015 hevði gott pláss í framløgu løgmans, so kanska er hetta tekin um, at hetta áhugaverda skjal kemur fram aftur í ljósið. Tað er eisini áhugavert, at visjónin verður knýtt at altjóðaagerðini og teimum avbjóðingum og møguleikum, sum Føroyar hava í globaliseringini.

Tað er ymiskt, sum bendir á, at løgmansembætið so smátt er við at broytast í hesum árum.
Við nýggju stýriskipanini og fyrisitingarligu bygnaðarbroytingunum fingu landsstýrismenninir nógv meira vald og nógv størri ábyrgd í mun til stjórnarleiðaran, meðan hesin sat eftir leiklutinum sum eftirlitsmaður og samskipari. Politiska vald og ávirkan løgmansembætisins eru minkað samsvarandi í mun til leiklut landsstýrismanna. Tað er tí ikki løgið, at embætið broytir innihald og søkir nýggjar avbjóðingar og nýggjan leiklut í politisku skipanini. Ein týðandi táttur er umboðanin uttanlands á hægsta stigi. Her kunnu vit læra av grannum okkara og tá vit jú í løtuni eru heppin at hava tignarligan løgmann, ið ber seg væl innan- sum uttanlands, ja so liggur ræði fyri, at løgmaður í nógv størri mun átekur sær leiklutin sum forsprákari fyri føroyskum áhugamálum uttanlands.

**Sosialurin**

## Eru Føroyar á veg inn í eina nýggja feduala stýrisskipan?

PETUR MOHR REINERT



Hvaðani komu boðini um at bróta lógina og senda lýsingar mitt í sendingum í Kringvarp Føroya?

Heilsurenningin er eitt sera gott tiltak. Serliga fyri familjur at vera saman um nakað gott. Minnist "enn" "ein túr" sum barn saman við foreldrunum.

MEN... lat ongan iva vera um, at Hans Pauli Strøm "kann" brúka hesa renning, eins og hann hevur gjørt áður, til sína politisku profilering. Hann stillar smílandi og fróður upp til hvørja einastu - bíløgdu og ikki bíløgdu upptøku hjá Kringvarp Føroya at vísa, at hann er sunnur - og so øll eru glað, ha?

Ikki eg. Ikki tí. Hans Pauli er ein fittur maður og uttan iva ein hin besti landstýrismaðurin í heilsumálum vit hava havt. Onkur kvinna hevur gud hjálpi mær verið ein katastrofa eins og flestu menn í sama starvi.

MEN... Vit hava eina kringvarpslóg sum eisini umfatar lýsingar í Kringvarp Føroya.

Púra klokkureint: Ikki loyvt at lýsa mitt í sendingum - goymt ella opið - bert í blokkum millumsendingar.

Hesa treyt mugu vinnulív, privat fólk, feløg og øll onnur lúka.

MEN... ikki heilsurenningin við landstýrismaninum Hans Paula Strøm á odda.

Morgun aftan á morgun, dag eftir dag, lata kringvarpsfólk og onnur fræls ítróttarfólk seg brúka til egnan og annara fyrimun.

Hetta kundi man sagt var í fínasta lagi...

MEN... minist nakar Sovjet og kanska onkur, um ikki minnist, so hevur lisið ella hoyrt um Gõbbels?

Vit kunnu eisini bara kalla tað propaganda. Ikki serliga væl goymd ikki serliga væl umhugsað, men so týðulig sum trøll á alljósum degi.

Eitt er, at tað er ein góð søk, men er tað so í lagi at bróta lógina?

Er tað OK? NEI.

Hvat verður tað næsta "góða" átakið? Fáa fólk at leggja av at roykja, at drekka brennivín, roykja hassj, ganga meir í kirkju á møti, melda seg inn í felagskapir av ymiskum góðum slag.... byrjar tað at minna um okkurt?

Nær fer næsti landstýrismaðurin - vóni ikki kvinnurnar fara at vera líka dorskar sum mennirnir í politikki hava verið - at brúka "hentu idiotarnar" í "teirra" kringvarpi til at fremja teirra "góðu" søk.

PS: Eg fann forrestin upp á navnið "Kringvarp" í blaðnum VikuSkifti, sum Vikublaðið gav út summarið 2005, og sum Kringvarp Føroya so hegnisliga tók til sín. Tó uttan at siga okkum takk fyri lán.

## Mótmæli og avsanning

HØGNI HOYDAL



Undirritaði skal hervið staðiliga avsanna tær grovu ákærur og ósonnu søgur, sum Sosialurin, Portalurin og Rás2 bera fram ímóti mær í dag.

Havi fingið mangar lygisøgur omanyvir meg í mínum politiska virki, men hendan ber av øllum.

Eg havi hvørki gjørt meg inn á nakran ella nakað í Tinganesi.

Var uppringdur av blaðmanni á Sosialinum í dag og segði, at eg greitt kundi afturvísa slatrisøgum um meg og sjálvandi ikki vildi gera aðrar viðmerkingar til slíkt. Kortini velur Sosialurin at prenta ósannindir og útspilling av mær á henda hátt og siterar meg fyri onga viðmerking at hava, og at eg hvørki vil vátta ella avsanna hesi ósonnu tíðindi.

Tí mundi eg satt at siga dottið uppeftir, tá eg í kvøld eftir ein strævnan arbeiðsdag lesi og hoyri tey ósannindi, sum omanfyrinevndu miðlar leggja meg undir vísandi til ónevndar keldur.

Her er talan um eitt nýtt lágmark í fjølmiðlaflutningi.

### Viðmerking til Høgna Hoydal

Ilt er at vita, hvat Høgni Hoydal meinar. Tí tað einasta hann segði, tá vit bóðu hann um viðmerking til málið var, at hann "*ikki kundi gera viðmerkingar til slíkt slatur og sleyg, og tá ið vit hoyra slíkar søgur, máttu vit venda okkum til embætisfólkini, tí talan var ikki um eitt politiskt mál*".

Marjun Hanusardóttir váttaði, at "kontrovers er um skrivstovur".

Síðani greinin var í blaðnum, hava vit fingið at vita frá fleiri keldum, at rættiliga álvarsamt stríð er millum løgmann og Høgna Hoydal um hølisviðurskifti í Tinganesi.

Tað frætta vit meira um, tá vit hava fingið alment innlit í málið.

**Blaðstjórnin**

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.